# Fjølmiðlar í leysum lofti



*Brúdleypsølið frá Føroya Bjór*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Føroyskt brúdleypsøl

**Í samband við ølstevnu í Valby um vikuskiftið, hevur Føroya Bjór gjørt eina serliga Fríðrik og Mary øl**

BRÚDLEYPSØL
*Páll Holm Johannsen*
*pall@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið verður árliga øl-stevnan í Valby-høllini. Seinastu árini hevur Føroya Bjór luttikið á stevnuni, og aftur í ár fer Føroya Bjór at hava ein bás. Bryggjaríini á stevnuni koma úr fleiri ymiskum londum, og góð 400 sløg av øli verða at fáa á stevnuni.

Í samband við kongaliga brúdleypið fríggjadagin, hava fyrireikararnir á ølstevnuni eggja luttakarunum at bryggja eina serliga Fríðrik og Mary øl. Á Føroya Bjór tóku tey av møguleikanum, og við sær í viðførinum til Danmarkar verður ein føroysk brúdleypsøl.

Av Føroya Bjór verður sagt, at ølin minnir nógv um páskabryggið, sum hevur verið heiðrað fleiri ferðir. Sum skilst hava eini 30 bryggjaríir gjørt eina kongaliga øl, og sunnudagin er ætlanin at kjósa bestu ølina á stevnuni í Valby-høllini. Spennandi verður at fylgja, hvussu føroyska brúdleypsølið fer at standa seg.

**Løgfrøðingurin Annfinn V. Hansen sigur, at tað ber ikki til hjá tí almenna at áseta, hvørji hjástørv fólk í føroysku fjølmiðlunum kunnu røkja og ikki**

TRÚVIRÐIÐ HJÁ FJØLMIÐLUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í Sosialinum í farnu viku fekk stjórin í Útvarpi Føroya, Jógvan Jespersen, av grovfílini frá fjølmiðlafólkunum Una Arge og Brynhild Thomsen, tí hann situr sum stjóri á ÚF, meðan hann samstundis røkir nevndarsess í Føroya Banka.

Bæði fjølmiðlafólkini róðu fram undir, at fremsta uppgávan hjá fjølmiðlunum er at hava eftirlit við valdsharrunum, og tí kann stjórastarvið hjá Jógvani Jespersen í Útvarpi Føroya als ikki sameinast við nevndarsessin hjá honum í Føroya Banka.



*Løgfrøðingurin, Annfinn V. Hansen, sigur at tað ber ikki til hjá tí almenna at áseta, hvørji hjástørv fólk í føroysku fjølmiðlunum kunnu røkja og ikki.*

*Mynd: Savnsmynd*

### Stýrisskipanin vísir veg

Í 1995 varð Stýrisskipan Føroya sett í gildi. Eitt av aðalmálunum við nýggju stýrisskipanin var at fáa eitt greitt býtið millum lóggevandi løgtingið og útinnandi landsstýrið.

Ein av uppgávunum hjá løgtinginum er at hava eitt vakið eyga við, at landsstýrið røkir sítt vald á haldgóðan hátt. Fyri at tryggja, at løgtingslimir veruliga kunnu hava eftirlit við landsstýrinum, eru greiðar ásetingar í Stýrisskipanini um, at limir í løgtinginum skulu niðurleggja øll álitisstørv í nevndum og ráðum, sum eru undir eftirliti landsstýrisins.

Løgtingslimur hevur eitt nú ikki loyvið til at røkja ein nevndarsess í Atlantic Airways, sum er stovnur undir landsstýrinum, meðan hann situr í løgtinginum. Henda áseting tryggjar, at løgtingslimir eru skikkaðir at viðgera landsstýrið, uttan at ivi verður sáddur um teirra gegni.

### Lógleysir fjølmiðlar

Meðan greiður skilnaður er ásettur í Stýrisskipanini um, at løgtingið skal verða óheft av landsstýrinum, er støðan heilt øðrvísi í føroysku fjølmiðlunum.

Í Sosialinum í farnu viku varð víst á óhepnu ognarviðurskiftini á Dimmalætting, Sosialinum og Fregnum. Eisini varð nevndarsessurin hjá útvarpsstjóranum havdur á lofti. Samanumtikið kundi staðfestast, at ongar greiðar reglur eru fyri fjølmiðlarnar, hvørki tá tosað verður um ognarviðurskiftið ella leiðsluviðurskiftið í føroysku fjølmiðlunum.

Tað er undrunarvert, at ongar greiðar ásetingar eru fyri føroysku fjølmiðlar á hesum økjum. Í prinsippinum røkja løgting og fjølmiðlar somu uppgávu, tí orðið eftirlit er kjarnuhugtak hjá báðum pørtum.

Vit hava spurt ein av fedrunum til Stýrisskipan Føroya, Annfinn V. Hansen, um ikki greiðar ásetingar áttu at verið fyri føroyskar fjølmiðlarnar, sum tryggjaðu, at starvsfólk í føroysku fjølmiðlunum, eins og løgtingslimir, halda fingrarnar burtur frá nevndarsessum og øðrum valdspostum, sum kunnu seta fjølmiðlafólk í eina óskikkaða støðu.

### Einki formelt vald

Ein av hornasteinunum í vesturlendsku samfeløgunum er trýbýtið av valdinum. Grundhugsjónin handan trýbýtið er, at lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið skulu hava eftirlit við hvørjum øðrum.

Hugtakið, tað fjórða statsvaldið, hevur síðan stungið seg upp. Meðan ting, stjórn og dómstólar eru tey trý statsvøldini, hava fjølmiðlarnir fingið heitið sum fjórða statsvaldið.

Omanfyri varð víst á, at meðan greiðar ásetingar eru fyri ting, stjórn og dómstólar í Stýrisskipanini, so valdar lógloysi í Føroyum fyri fjórða statsvaldið, fjølmiðlarnar.

Skuldu greiðar ásetingar ikki eisini verið fyri fjølmiðlarnir ?

– Hóast vit vanliga kalla fjølmiðlarnar fyri fjórða statsvaldið, hava fjølmiðlarnir formelt einki vald. Tað ber tí ikki til at áseta almennar reglur fyri fólk innan fjølmiðlarnar um hvørjar nevndarsessir, tey ikki skulu røkja, sigur Annfinn V. Hansen.

Hann vísir á, at hóast fjølmiðlarnir formelt einki vald hava, so er veruleikin øðrvísi.

– Føroysku fjølmiðlarnir hava ómetaliga stórt vald, og fleiri dømið eru um, har fjølmiðlarnir stýra viðgerðini av málum. Løgfrøðiliga sæð ber kortini ikki til frá almennari síðu at lóggeva fyri einum ávísum bólki (fjølmiðlunum, blðm) um, hvørji størv starvsfólkini kunnu røkja og ikki, vísir Annfinn V. Hansen á.

### Innanhýsir lógir

Útvarp – og Sjónvarp Føroya eru bæði fevnd av lógunum um public service. Public Service ásetingin áleggur báðum stovnunum at hava eina ávísa breidd í tíðindaflutinginum.

Spurdur, um onnur løgdømi ikki hava greiðar reglur fyri, hvørji hjástørv skattagjaldarans fjølmiðlafólk kunnu røkja, svarar Annfinn V. Hansen, at vanliga hava almennir fjølmiðlar í øðrum londum innanhýsis lógir á hesum økinum.

Í leygardagssosialinum greiddi stjórin í SVF, Mikkjal Helmsdal frá, at stovnurin um ársskiftið 2001/2002 setti slíkar reglur í gildið fyri starvsfólkini í SVF.

Í hinum almenna fjølmiðlunum, Útvarpi Føroya, eru ikki nakrar fastar mannagongdir um, hvørji hjástørv starvsfólkini á stovninum kunnu røkja.

### Privat frítikin

Meðan ÚF og SVF mugu lúka Public Service treytirnar, hava privatu miðlarnir eitt størri frælsi. Annfinn V. Hansen greiðir frá, at løgfrøðiliga hava privatu miðlarnir nógv størri frælsi enn almennu miðlarnir-eisini tá tað kemur til starvsfólkapolitikk

Hann vísir á, at tað er nógv torførari at áleggja privatu miðlunum reglur enn almennu miðlunum.

Velur tað almenna at gera reglur fyri starvsfólkini á privatu miðlunum um, hvørji størv tey kunnu røkja, so ger tað almenna seg inn á grundlógartryggjaða rættin hjá borgaranum, og tað er ógvuliga vandamikið, sigur Annfinn V. Hansen løgfrøðingur at enda.



# Skulu gera miðstøðir til minnisveik í Havn



*Í hesum húsunum á Dalavegi 4, fer Alzheimer felagið í summar at skipa eina miðstøð við nógvum ymsum tilboðum fyri minnisveik og teirra avvarðandi*

**Árið í ár verður eitt rættiligt frambrot fyri tey, sum eru minnisveik í Havn og teirra avvarðandi**

MINNISVEIK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Táið tosað verður um eldrarøkt, verða tey minnisveiku oftani tikin fram, sum ein bólkur, ið krevur heilt serligar umstøður.

Men árið í ár verður eitt rættiligt frambrot fyri tey minnisveiku í Havn og teirra avvarðandi.

Ì ár lata nevniliga ikki færri enn tveir dagstovnar upp í Havnini, sum eru ætlaði minnisveikum og teirra avvarðandi.

Tað hevur fyrr verið frammi, at Tórshavnar Býráð ætlar at gera dagumlætting til minnisveik á Tjarnargarði, sum er gamla Marinustøðin.

Har verður pláss fyri 12 fólkum og tað letur upp í september.

Men nú hevur Alzheimer-felagið eisini tikið stig til at lata eina miðstøð upp í Havn fyri minnisveik og teirra avvarðandi.

Eisini á tí heiminum verða pláss fyri umleið 10 fólkum.

Felagið hevur søkt býráðið og Landsstýrið um fíggingtil ætlanina. Sosiala nevnd hjá Býráðnum hevur mælt býráðnum til at samtykkja málið. Og landið er eisini sinnað at betala sín part, tí peningur er eisini settur av á fíggjarlógini hjá løgtinginum til endamálið. Tað einasta, sum kundi broyta tað, er at Løgtingið feldi málið, tá ið fíggjarlógin fekk sína seinastu og endaligu viðgerð seinnapartin í gjár, eftir at blaðið var farið til prentingar.

Men tað var tó ikki væntandi.

Sigrún Mohr, forkvinna í Alzheimerfelagnum, sigur, at felagið hevur bæði hús og starvsfólk tøkt til sína ætlan.

Hon sigur, at verður ætlanin góðkend, hevur felagið fingið tilsøgn um at fáa húsini á Dalavegnum 4 til leigu til endamálið.

### Tvey ára royndarverkætlan

Ætlanin hjá Alzheimer felagnum er ein verkætlan, sum gongur yvir tvey ár og tað, sum liggur í kortunum, er, at Tórshavnar Kommuna og landið betala hvør sína helvt. Býráðið fer at taka endaliga støðu til málið seinni, men sosiala nevnd hevur mælt til at samtykkja tað, so tað verður tað allarhelst. Og hendi ikki okkurt heilt óvæntað, samtykti løgtingið seinnapartin í gjár, at landið skal eisini betala sín part.

Tilsamans er talan um eina ætlan sum kostar undir tríggjar milliónir hesi bæði næstu árini og talan verður sostatt um eina útreðslu uppá undir hálvaaðru millión tilsamans til landið og kommununa í part.

Ætlanin er at byrja beint eftir summarfrítíðina.

### Bróta upp úr nýggjum

Serliga spennandi er ætlanin hjá Alzheimerfelagnum, tí felagið sigur, at tað tiltakið, tey fara undir, er at bróta upp úr nýggjum á hesum øki.

Talan er um eina tvey ára royndarverkætlan og ætlanin er at leggja úrslitið av royndini fram á norðurlendskum Alzheimer-fundi í Føroyum í 2006, tá ið føroyska Alzheimerfelagið verður vertur.

Sigrún Mohr sigur, at endamálið hjá felagnum er at lata upp eina miðstøð fyri minnisveik og avvarðandi.

Hon sigur, at ein partur av hesi miðstøðini verður eitt dagheim, har pláss verður fyri umleið 10 fólkum.

Men ætlanin er eisini at hava eina ráðgeving í húsinum, bæði fyri avvarðandi og fyri fakfólk.

Í vikuskiftunum er ætlanin at kafé skal vera í húsunum, har.

At enda er ætlanin at hava ein samskipara við serligari útbúgving at vera um minnisveik og teirra avvarðandi knýttan at heiminum.

Men hesin samskiparin skal eisini fara til húsar hjá fólki, har minnisveik búgva, at ráðgeva og vegleiða.

– Endamálið við húsinum er at geva minnisveikum fólki eitt veruligt innihald í lívinum, tí ætlanin er eisini stimbra tey við serligari røkt og sostatt er hetta eisini eitt tiltak, sum fer at gera, at minnisveik kunnu vera longri heima.

– Men endamálið er eisini at hetta skal vera ein umlætting hjá teimum avvarðandi at minnisveikum, tí at vera avvarðandi hjá einum minnisveikum er 24-tíma arbeiðið hvørt einasta samdøgur og tí er tað ómetaliga krevjandi.

Hon sigur eisini, at støðan á økinum er sera vánalig.

– Tað er ruðuleiki á økinum. Tað standa eini 150 fólk á listanum yvir tey, sum hava bráðneyðugan tørv á røktarheimsplássum og mett verður, at ein fittur partur av hesum eru minnisveik, tó at vit ikki kenna talið.

Hvørja lagnu miðstøðin fær, tá ið royndartíðin er liðug í 2006, verður tikið upp tá.

## Fegnast um at einstaklingar ganga á odda

**Nógv tiltøk byrja við, at einstaklingar ganga á odda og draga tað almenna aftaná sær og tað er at fegnast um, sigur Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum**

UNDANGONGUFÓLK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið Hans Pauli Strøm fekk umsóknina frá Alzheimer felagnum um at fíggja eina miðstøð fyri minnisveik í Havnini, saman við Tórshavnar Kommunu, var tað skjótt at niðurstøðan varð at hetta var eitt tiltak, sum tað var vert at stuðla.

Talan er um eina tvey ára royndarverkætlan og hvat víðari hendir, verður so tikið upp aftur, tá ið royndartíðin er liðug í 2006.

Eins og greitt er frá í hinari greinini, er talan um at gera eina miðstøð fyri minnisveik og teirra avvarðandi.

– Eg kann ikki annað enn fegnast um, at tað eru einstaklingar, sum ganga á odda og taka stig til ymisk tiltøk, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann sigur, at veruleikin er, at tað eru nógv góð tiltøk, sum eru byrjað við, at einstaklingar hava gingið á odda og hava síðani drigið tað almenna aftaná sær.

– Sostatt eru nógv tiltøk fingin á føtur, sum annars kanska ikki høvdu sæð dagsins ljós, ella í øllum førum høvdu verið seinkað.

Men sjálvandi skal støða í hvørjum einstøkum føri takast til um talan er um eitt gagnligt tiltøk, tí vit mugu eisini hava í huga, at tað er skattaborgarans peningur, vit umsita.

Hans Pauli Strøm leggur kortini dent á, at hóast tað í mongum førum eru einstaklingar, sum ganga á odda, má hetta ikki brúkast sum ein umbering hjá tí almenna at sleppa sær undan teimum skyldum, tað almenna hevur.

– Men við tiltøkum sum hevur, eru einstaklingar við til at vísa á gongdar leiðir og tað er ikki annað enn at fegnast um, sigur landsstýrismaðurin.

### Vánaligar umstøður

Hann ásannar, at umstøðurnar hjá teimum minnisveiku eru alt annað enn góðar.

– Tað eru alt ov fá røktarheimspláss og støðan hjá teimum, sum búgva heima, eru eisini sera vánaligar.

– Tí er tað at fegnast um, at Alzheimer felagið tekur stig til eitt dagtilboð, har endamálið er at stimbra tey minnisveiku, fyri at royna at varðveita tann førleika, tey hava og fyri at tey kunnu hava samband við onnur.

Samstundis letur eitt dagtilboð til minnisveik upp á Tjarnargarði, og tað fær eisini fígging á fíggjarlógini, sigur Hans Pauli Strøm.



*Umstøðurnar hjá teimum minnisveiku, eru alt annað enn góðar og tí er tað at fegnast um, at Alzheimer felagið vil ganga á odda, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum*